1st Klaksvík International

Ein altjóða kapping í talvi fer í hesum døgum fram á Hotel Norð á Viðareiði. Fimm útlendskir telvarar eru komnir til Føroya at telva í móti fimm av okkara frægastu telvarum. Í hesum sambandi var lítil móttøka hildin í býráðssalinum leygardagin

TALVKAPPING
Solby A. Eliasen

Móttøkan byrjaði við, at Steinbjørn Jacobsen, borgarstjóri beyð øllum at vera vælkomnum til Klaksvíkar. Síðani helt Rani Nolsøe, formaður í Talvsamband Føroya ræðu. Hann tosaði millum annað um týdningin fyri føroyska telving, at hesin møguleikin til at telva móti sterkum útlendskum telvarum er til staðar. Hann legði eisini dent á, at uttan stuðulin frá vinnulívinum og øðrum fyritøkum í Føroyum, so hevði tað als ikki kunnað latið seg gjørt at hildið kappingina.

Og nógv varð eisini gjørt fyri at ein lættliga kundi fáa eyga á stuðlarnar. Á einum lítlum veggi beint aftanfyri Rana og hinar, sum eisini hildu ræðu henda dagin, hingu skelti við teim ymsu stuðulunum.

Aðrir, sum eisini hildu ræðu henda dagin, vóru, Jákup Mikkelsen fyri JFK Heilsølu og so Mogens Nielsen, sum er altjóða dómari og eygleiðir kappingina at alt fer fram, sum tað skal.

Á hesi móttøkuni fór lutakastið fram, um hvussu teir skuldu spæla fyrsta umfar. Teir vórðu róptir upp eftir ratingtølunum. Tað vil siga, at tann sterkasti fór fyrst og so niður eftir. Ratinglistin, sum gingið var eftir, var tann altjóða ratinglistin.

Ein fyri og annar eftir komu telvararnir upp eftir eini gávu frá Klaksvíkar Kommunu, har millum annað ein bóklingur um Klaksvíkar Kommunu var. Í hesum bóklinginum stóð so eitt tal, sum segði hvørjum viðkomandi telvari skuldi telva ímóti í fyrsta umfari.

Eyðun Nolsøe kom upp sum tann nýggjundi í røðini, og hann segði skemtandi: "Hvar er so hatta fýratalið"? Og so tók hann ein bólkling, og heppin var hann, tí inni í stóð fýratalið. Tað bleiv ein lítil látur eina løtu. Hví tað var so umráðandi fyri Eyðun at finna fýratalið, greiddi Rani Nolsøe frá aftan á lutakastið.

Tað er soleiðis, at um ein tekur tøl frá eitt til fimm, so fær ein fimm hvít talv og fýra svørt. Og tað er ein fyrimunur í talvi, líka sum tað er ,at hava servuna í tennis.

Kappingin

Talvkappingin byrjaði leygardagin og tá varð telvað einaferð. Síðani vórðu tvey talv sunnudagin og so tvey um dagin inntil mikudagin, tá kappingin endar. Kappingin fer fram á Hotel Norð á Viðareiði undir framúr góðum umstøðum, har telvararnir eisini búgva.

Rani Nolsøe, formaður í Talvsamband Føroya sigur, at orsøkin til at kappingin fer fram í Norðoyggjum er, at hann byrjaði upp á fyrireikingarnar har, og so var tað so líka til, at kappingin bleiv løgd í Norðuroyggjum.

Talv er eitt av teimum fáu spælunum, sum ikki er baserað upp á hepni, um ein hyggur at tí frá einum óobjektivum sjónarhorni.

Tað vil siga, at um ein ikki heldur tað vera heppið, at hin ger eitt mistak. So hevur spælið sum so onki við hepni at gera. Tað er eitt spæl, har alt verður strategiskt lagt til rættis og tað skal sera nógv konsentration til. Ein má vera vælfyrireikaður til eina tílíka kapping sum hesa, og høvdið má vera klárt.

Henda altjóða kappingin kann sigast at vera ein styrkisroynd hjá teimum føroysku telvarunum. Hvør telvari skal telva níggju talv hvør, og um tað eydnast einum at vinna seks av teimum, so hevur viðkomandi ognað sær ein tríðing av heitinum sum IM meistari. Tað, sum verður kallað ein IM norm. IM stendur fyri International Master. Og tað er ein sera heiðurligur tittul innan talv. Men henda kappingin gevur sum sagt bert ein tríðing (ein norm) av tittlinum. So skal viðkomandi telva í tveimum kappingum aftur at fyri at ogna sær hinar báðar tríðingarnar. Ein vinnur bert ein tríðing í hvørjari kapping. Og føroysku telvararnir hava sjálvsagt sett sær sum mál at fáa fyrsta IM normin í kassan í hesi kappingini.

Men sum gongdin hevur verið í kappingini higartil, so letur tað til, at føroysku telvararnir missa ov nógv stig longu í byrjanini. Tað kann tí fara at verða torført at vinna tað innaftur. Men enn eru fleiri umfør eftir, so onki er avgjørt enn. Kappingin endar sum sagt mikudagin.

1st Klaksvik International: Lutakast fór fram á móttøkuni, um hvør skuldi møta hvørjum í fyrsta umfari á hotellinum á Viðareiði leygardagin

Kom við upp á avboð

Kim Pilgaard kom við í 1st Klaksvík International av tilvild. Á móttøkuni í Býráðssalinum í Klaksvík leygardagin nýtti Sosialurin høvi til at fáa eitt prát við IM meistaran

TALVKAPPING
Solby A. Eliasen

IMmeistarin Kim Pilgaard kom við í 1st Klaksvík International vegna avboð hjá einum øðrum

Klaksvík: Hægst rataði telvarin í 1st Klaksvík International, Kim Pilgaard kom við av tilvild. Ein hevði givið avboð, og so varð hann spurdur, um hann hevði hug at verða við.

Hann sigur, at hann hevur spælt í Spania í tvey ár nú, og orsakað av, at hann so tilvildarliga kom við í hesa kappingina, so hevur hann ikki havt so góða tíð til at fyrireika seg. Men hann ivaðist ikki og segði ja beinanvegin, tí tað er ikki á hvørjum degi, at hann fær ein tílíkan møguleika, sigur hann.

Hann letur avbera væl at umstøðunum til at telva á Viðareiði.

– Tað eru fantastiskar umstøður. Har er friðarligt og perfekt til at telva, sigur hann.

Um kappingina sigur Kim Pilgaard, at tað eru fleiri sera áhugaverdir og evnaríkir telvarar millum føroysku luttakararnar í kappingini. Hann nevnir eitt nú Hans Kristian Simonsen og John Arna Nilssen.

Hann greiðir frá, at hann trekti nummar sjey í lutakastinum, og tað merkir, at hann skal telva fimm svørt og fýra hvít talv.

– Tað er ein vansi, men nú fáa vit at sígga, hvussu leikur fer fram, sigur hann. Kim Pilgaard vann IM tittulin sum 32 ára gamal, og tað verður mett at vera í tí eldra endanum fyri at vinna ein tílíkan tittul. Hann hevur telvað, síðani hann var 15 ára gamal og fyri tveimum árum síðani segði hann sítt starv upp fyri at telva fulla tíð.

Venjing til OL

Eyðun Nolsøe er ein av føroysku telvarunum í 1st Klaksvík International. Á móttøkuni leygardagin trekti hann fýratalið, sum merkti, at hann í fyrsta umfarinum skuldi møta Kim Pilgaard, sum var tann hægst rataði av teimum á altjóða ratinglistanum

TALVKAPPING
Solby A. Eliasen

Klaksvík:
Á móttøkuni leygardagin segði Eyðun, at henda kappingin er ein góð venjing til Olympiaduna, sum verður seinni í hesum mánaðinum.

Hann segði eisini, at hann fór at fáa sína sak fyri beinanvegin, tí hann skuldi møta tí sterkasta. Hann segði, at hann var bæði spentur, glaður og nervøsur fyri hesum møguleikanum at telva ímóti so sterkum telvarum.

– Kim Pilgaard er rataður 200 stig hægri enn eg á listanum, so eg fari ikki at gráta, um eg tapi. Tað er púra vist. Men eg hevði verðið avbera glaður fyri ein javnleik, segði Eyðun leygardagin.

Og seinni leygarkvøldið, tá fyrsta umfar var av, frættist at Eyðun Nolsøe og Kim Pilgaard høvdu telvað javnt.

Eyðun segði eisini leygardagin, at tað er eitt upplivilsi bara at fáa møguleika til at telva ímóti hesum útlendsku telvarunum.

Hann tosaði eisini hetta at fyrireika seg til eina tílíka kapping.

– Tað kann so at siga ikki lata seg gera í dag, um ein telvari ikki hevur teldu. Allir telvarar í dag hava teldu, so ein kann hyggja eftir og fylgja við talvum á netinum.

Leygardagin klokkan fimm byrjaði so fyrsta umfarið av kappingini, og sum sagt, so eydnaðist tað Eyðuni Nolsøe at telva javnt í móti Kim Pilgaard.

Sunnudagin telvaði hann so í móti Ólavur Simonsen í øðrum umfari, og tað talvið tapti hann. Meðan hann vann ímóti Hans Kristian Simonsen í triðja umfari.

Saman við øllum hinum telvarunum, skal Eyðun so telva tvey talv um dagin, inntil mikudagin, tá kappingin endar.

Eyðun Nolsøe vónaði undan umfarinum leygardagin, at hann fór at fáa javnleik ímóti Kim Pilgaard. Og tað eydnaðist honum

Stuðulsstovnurin ikki fluttur fyribils

Tað kemur neyvan uppá tal at flyta Stuðulsstovnin til Runavíkar, í hvussu er ikki fyribils. Ikki ein króna er sett av í fíggjarlógaruppskotin um til at flyta stovnin, og landsstýrismaðurin í mentamálum hevur enn ikki tikið nakra avgerð í málinum

STUÐULSSTOVNURIN
Jón Brian Hvidtfeldt

Líkt er til, at avgerðin, fyrrverandi landsstýrismaðurin í mentamálum Torbjørn Jacobsen, tók fyri góðum tveimum árum síðan um at flyta Stuðulsstovnin úr Havn til Runavíkar, ikki verður framd í verki kortini.

Síðan politiska útmeldingin um at flyta stovnin kom á sumri 2000, hevur stovnurin at kalla livað í óvissuni. Eftirmaðurin hjá Torbjørn Jacobsen í Mentamálastýrinum, Óli Holm, staðfesti fyri góðum hálvum øðrum ári síðan í svari uppá fyrispurning í Løgtinginum, at avgerðin um at flyta stovnin til Runavíkar stóð við, og hann setti eisini í verk eina kanning av støðuni hjá Stuðulsstovninum. Kanningin vísti, at mótstøða var innanhýsis á stovninum móti at flyta til Runavíkar, og síðan er einki hent í málinum.

Tá Annlis Bjarkhamar í summar tók við sum landsstýrsmaður í mentamálum boðaði hon frá, at framtíðin hjá Stuðulsstovninum skuldi takast upp til nýggja viðgerð. Landsstýrismaðurin vil hava greiðu á, hvør uppgávan hjá Stuðulsstovninum verður í framtíðini, og hvar og hvussu henda uppgáva kann røkjast best. Hesar spurningar verður framvegis arbeitt við í Mentamálaráðnum, men niðurstøða er ikki gjørd. Tí hevur Annlis Bjarkhamar enn ikki tikið støðu í málinum.

- Tað er greitt, at politiska útmeldingin hjá undanmanni mínum um at flyta Stuðulsstovnin stendur við, til ein onnur avgerð er tikin, sigur Annlis Bjarkhamar. Hon vísir tó á, at eftir hennara tykki er skilabest at fáa eina mynd av, hvønn profil Stuðulsstovnurin skal hava í framtíðini, áðrenn stovnurin verður fluttur. Millum annað verður arbeitt við, í hvønn mun tað ber til at samanfletta ráðgevingaruppgávur við tær uppgávur, sum Stuðulsstovnurin í dag røkir.

Eingir pengar til flyting

Hóast spurningarnir um framtíðarstøðu Stuðulsstovnsins hava verið nógv umroddir í Mentamálaráðnum, so ber til at lesa burturúr fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár, at stovnurin neyvan verður fluttur fyribils. Hóast tað fyriliggur ein politisk avgerð um at flyta stovnin, so er ikki ein króna sett av til endamálið næsta ár, og heldur ikki í langtíðarætlanunum er nøkur játtan at hóma.

Annlis Bjarkhamar vil ikki siga, hvørt manglandi játtanin skal tulkast sum um at avgerð longu er tikin í Mentamálaráðnum um, at Stuðulsstovnurin ikki verður fluttur kortini. Hon ásannar tó, at skuldi hon komið til ta niðurstøðu, at rættast er at flyta stovnin, so kann tað gerast sera trupult at finna pengar til endamálið, tá einki er sett av í fíggjarlógaruppskotinum. Til ber sjálvsagt at játta pengar við eini eykajáttanarlóg, men mest sannlíkt er tó, at landsstýrismaðurin verður noydd at finna pengarnar aðrastaðni á verandi játtan til útbúgving og gransking, skal stovnurin flytast. Út frá hesum er mest sannlíkt, at Stuðulsstovnurin, eisini næsta ár fer at húsast í hølunum hjá Mentamálaráðnum við Hoyvíksvegin í Havn.

Landsstýrismaðurin í mentamálum sigur, at hon vónar at fáa greiðu á, hvør framtíðar uppgávan hjá Stuðulsstovninum skal vera, innan heilt stutta tíð.

Annlis Bjarkhamar hevur enn ikki tikið støðu til, hvørt Stuðulsstovnurin skal flytast ella ikki. Men staðfestast kann, at ikki ein króna er sett av til endamálið í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár

Fyrireika Norðoya skúladepil

Eftir nýggjár verður farið undir fyrstu fyrireikingarnar til bygging av nýggjum hølum til HT-útbyggingina í Klaksvík. 200.000 krónur eru settar av til fyrireikingarnar í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár

SKÚLABYGGING
Jón Brian Hvidtfeldt

Eins og fleiri aðra staðni í landinum hevur Tekniski skúlin í Klaksvík eisini tørv á fleiri og betri hølum. Tí verður í næstum farið undir fyrstu fyrireikingarnar til at bøta um viðurskiftini, serliga hjá teimum, sum eru knýtt at HT-útbúgvingini, ið gevur eitt teknisk studentsprógv.

Í fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár eru 200.000 krónur settar av til endamálið, sum í uppskotinum hevur fingið heitið »Norðoya skúladepil«. Annlis Bjarkhamar, landsstýrismaður í mentamálum, sigur, at pengarnir eru ætlaðir til at fyrireika nakrar langtíðarætlanir, sum skulu fremjast, tá pláss aftur er á íløgusíðini á fíggjarlógini.

Eftir nýggjár skal ein byggifyririekingarnevnd setast, sum skal finna út av, hvør besta loysnin er fyri hægri teknisku útbúgvingina í Klaksvík. Annlis Bjarkhamar sigur, at í fyrstu atlogu verður arbeitt við, at HT-útbúgvingin í Klaksvík skal fáa seks skúlastovur afturat. Umframt at tað fer at bøta munandi um umstøðurnar hjá teknisku studentaskúlanæmingunum, so fer útbyggingin eisini at geva betur pláss á restini av Tekniska Skúla í Klaksvík, har HT-næmingarnir í dag húsast.

Landsstýrismaðurin sigur, at tað er greitt, at 200.000 røkka ikki langt í hesum høpi, men at pengarnir fyrst og fremst eru settir av til eina langtíðarætlan, sum um nøkur ár skal síggjast aftur í Klaksvík. Annlis Bjarkhamar sigur, at málið er at fáa tær fimm verandi miðnámsútbúgvingarnar (Student, HF, HT, HH og Fiskivinnuskúlan), sum í dag virka sum fimm sjálvstøðugar eindir, knýttar tættari saman, fyri á tann hátt at skapa nakrar betri og fjølbroyttari útbúgvingar. Sum liður í hesum málsetningi er so ætlanin at menna Norðoya skúladepil.